*Paul Watson lovar nú at steðga grindadrápinum einaferð med alla:*

# Hevur brynjað seg út til kríggj við føroyingar

*Illa g1itni umhvørvisverndarmaðurin, Paul Watson, er á veg til føroyar nú í summar og hann sigur, at hann væntar harðar samanbrestir við føroyingar*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Nú skal grindadrápið í Føroyum steðgast einaferð med alla.

Tað hevur tiltikni umhvørvisverndarmaðurin, Paul Watson nú sett sær fyri.

Og tað ætlar hann sær at gera longu í summar.

Hann er nevniliga á veg til Føroyar við felagsskapi sínum Sea Shepherd og hann sigur, at hendan atsóknin ímóti Føroyum verður høvuðstiltakið hjá felagsskapinum í ár.

Tað er við nýggja skipi sínum „Ocean Warrior“ og undir herrópinum „Grindstop 2000“ at Paul Watson nú hevur sett kósina ímóti Føroyum.

Og her hevur hann sett sær fyri at seta í verk, størstu beinleiðis atsóknina ímóti føroyska grindadrápinum í meiri enn 10 ár.

### Væntar samanbrestir

Hann sigur, at atsóknin í Føroyum kann væntast at gerast drúgv, og hann er til reiðar at vera í Føroyum í juni og juli mánaða.

Og her ætlar hann at gera, hvat gerast kann fyri at forða fyri grindadrápinum.

Tað ætlar hann at gera við at leggja seg ímillum møguligar grindir og teir bátar, sum royna at reka grindina.



*Paul Watson væntar at tað fer at leika hart á, tá ið hann kemur til Føroyar í summar. Men hann sigur, at samanbrestir er ikki ókent fyri hann. Tað hevur mangan leikað hart á, sum t.d. tá ið eg var í Føroyum í 1986 og politiið skeyt eftir nær við høglbyrsu og táragassi. Men nú skal grindadrápið steðgast, einaferð med alla, sigur hann*

Soleiðis ætlar hann sær at órógva grindaraksturin so mikið, at hann fær rikið grindirnar til havs við „Ocean Warrior“, ístaðin fyri at tær verða riknar til lands.

Men hann væntar ikki, at tað fer at vera friðaligt undir Føroyum, so leingi hann er her.

– Tað er væntandi, at harðir samanbrestir fara at vera undir atsóknini í Føroyum, sigur Paul Watson í tíðindabrøvum.

Men tað eru hann fyrireikaðir upp á og hann ætlar ikki at lata set ræða av hóttanum frá føroyingum um at brúka vald ímóti honum.

Hann vísir eisini á, at samanbestir eru ikki ókent fyribrigdi.

Tey 23 árini, Sea Shepherd hevur søkt at teimum, sum drepa hval, hava mótstøðan ofta verið hørð.

Men oddamaðurin sigur, at øll hesi árini hevur ongin latið lív, tí tað verður dentur lagdur á at forða fyri.

Eisini táið Paul Watson var í Føroyum seinast í 1986, vóru samanbrestir ímillum hann og løgregluna.

–Tá skutu føroyskir myndugleikar fleiri ferðir eftir okkum við høglbyrsu og táragassi, tá ið vit royndu at reka grind til havs, sum føroyingar ætlaðu at reka til lands.

Hann sigur, at ta ferðina eydnaðist tað ikki at fáa enda á grindadrápinum, men kortini eydnaðist tað at bjarga nógvum hvalum við at reka teir til havs.

– Men hesuferð er eisini eitt danskt herskip undir Føroyum og tað ger støðuna eitt sindur óvissa, sigur Paul Watson.

Hann sigur sambært ES viðtøkum, hevur danska stjórnin ikki loyvi at stuðla hvalaveiði av nøkrum slag.

– So fáa vit at síggja, hvussu leikur ferð og hvussu danska herskipið fer at fyrihalda sær.

–Og hesuferð skal endi fáast á grindadrápinum einafeð med alla og vit eru til reiðar at sigla í vanda og at vinna á allari mótstøðu, bæði frá føroyingum og frá danska flotanum, fyri at røkka endamálinum.

### Fylgja væl við

Paul Watson sigur eisini, at øll heimsins eygu fara at fylgja við, tá ið hann kemur til Føroya í Summar.

Hann sigur, at eini 15 fjølmiðlafólk verða við á føroyaferðini hjá „Ocean Warrior“ og sostatt kann væntast, at tiltakið fer at fáa nógva umrøðu í alheims fjølmiðlunum.

### Fara at boykotta

Oddamaðurin í Sea Shepherd sigur, at samstundis sum „OceanWarrior“ er í Føroyum, verður arbeitt fyri at fáa handlar og fyritøkur, sum keypa og selja fisk, at boykotta Føroyskar fiskavørur.

Hann sigur at Sea Shepherd er farið saman við fleiri aðrar umhvørvisfelagsskapir í einum samskipaðum tiltaki, sum skal hava til endamáls at fáa fyritøkur og handlar at boykotta føroyskan fisk.

Sea Shepherd Conservation Society

*Undir hesum búmerkinum „Operation Grindstop 2000“, við føroyskum flaggi og deyðningahøvdi ætlar Paul Watson sær í hernað ímóti føroyingum í summar*

# Til Føroyar við flaggskipinum



*Paul Watson er nú á veg til Føroyar við flaggskipi sínum, „Ocean Warrior“ og hann ætlar sær at verða leingi her, um tað gerst neyðugt*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tá ið Paul Watson kemur higar í summar, verður tað við sjálvum flaggskipinum hjá umhvørvisfelagsskapinum, Sea Shepherd.

Talan er um „Ocean Warrior“, sum felagsskapurin keypti í 1996 og Paul Watson sigur, at keypið varð fíggjað fíggjað við gávum frá limunum.

Upprunaliga var hetta eitt norskt fiskirannsóknarskip, sum varð bygt í 1956. Fyrr nevndist tað Johann Hjort.

Sea Shepherd stovnaði eitt felag undir einum heilt øðrum navni, og tað felagið keypti so Johann Hjort frá einum norskum felag. Sambært Paul Watson vóru norðmenn í øðini, tá ið teir varnaðust, at hann hevði lumpað teir einaferð afturat. Tað er 54 metrar langt og 657 tons til støddar og tað hevur motor uppá 1.400 hestar.

Hann sigur, at skipið er bygt so sterkt, at tað kann sigla á pólleiðunum. Eftir at Sea Shepherd hevði keypt skipið, varð tað høvuðsumvælt í Bremenhaven í Týsklandi, eins og motorurin varð gjørdur ístand, allur sum hann er.

Skipið var liðugt í september í 1997 og tað er nú í slíkum standi, at tað fult út er ført fyri at bjóða einumhvørjum av, sum er á hvalaveiði á víðum havi.

Síðani tá hevur „Ocean Warrior“ tikið lut í tiltøkum í Miðjarðarhavi, at mótmæla fiskiskapi við rekagørnum og at vera við á altjóða hvalaveiðifundi í Monako. Síðani hevur skipið vart kóp í St. Lawrence Flógva og tað hevur eisini verið á herferð ímóti amerikanskari hvalaveiði í Kyrrahavi.



# Nýggj samkoma í Klaksvík

NEIL JOENSEN

Fyri umleið einum ári síðani fingu tríggir mans eitt kall at byrja eina nýggja samkomu í Klaksvík.

Tað vóru André Matras, Poul Nicolaj Steinberg og Eivinn Bringsberg, sum byrjaðu hesa samkomu, sum kallast Getsemane.

Tey hava møti runt í húsunum hjá hvørjum øðrum, av tí at tey ongan møtisal hava enn. Tey eru umleið 20 á møti sunnukvøldið, nógv av teimum hava verið á bíbliuskúla í Bergen.

Poul Nicolaj hevur verið á bíbliuskúla í Filipininum. André er pastor í samkomuni, men allir tríggir leiða. Mikukvøldið, einaferð um vikuna, samlast kvinnurnar.

Poul Nicolaj hevur eisini bíbliutíma, sum er hjá honum hvørt leygarkvøld kl 19.00. Teirra visión er fyrst og fremst at vera eitt heim fyri tey, sum ikki hava nakað andaligt heim. Men tey hava vent seg serliga til ungdómin, og vilja vísa honum á Jesus, siga tey.



*André Matras er próstur í nýggju samkomuni, Getsemane, í Klaksvík*



*Nýggi bygningurin hjá J&K Petersen er nú innilokaður, og um ikki so langa tíð, tá alt er gjørt klárt, er ætlanin at hátíðarhalda føðingardagin hjá virkinum, sum nú hevur rundað fyrstu fjórðingsøldina*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Alt á einum staði

*Fyri stuttum varð nýggi bygningurin hjá J&K Petersen innilokaður, og tá bygningurin um stutta tíð stendur liðugur, verður alt virksemið felagsins savnað á einum stað*

JÁKUP MØRK

Uppi á Hjalla arbeiða tey av fullum alvi. Fyri stuttum varð nýggi bygningurin hjá J&K Petersen innilokaður, og um ikki so langa tíð er arbeiðið hesum viðvíkjandi liðugt, soleiðis at alt virksemið kann savnast á einum stað.

Guggan, sum er stjóri í felagnum, sigur við Sosialin, at tað uttan iva verður ein stórur fyrimunur hjá virkinum, at tey soleiðis kunnu miðsavnað allar aktivitetirnar. Fyri einum fýra árum síðani varð blandistøðin flutt til Havnar, og at byrja við var tað bert hendan, sum húsaðist uppi á Hjalla. Tá nýggi bygningurin stendur klárur um stutta tíð, eru bæði blandistøð, smiðja og fyrisiting á einum stað, og hetta kemur sjálvandi at merkjast í gerandisdegnum.

### Fjórðings øld í ár

Felagið hevur annars 25 ár á baki í hesum døgum, og tá bygningurin stendur liðugur, er eisini ætlanin, at hesin varði í felagssøguni skal hátíðarhaldast.

Hesi 25 árini hevur felagið ment seg til at vera eitt av teimum stóru í føroysku byggivinnuni. Umframt betonarbeiði, har felagið við tíðini hevur ogna sær serkunnleika, hevur J&K Petersen eisini verið við í nógvum av teimum dýpingum, sum hava verið gjørdar, og framvegis verða tað, í ymsu havnunum í Føroyum. Harumframt eru dýpingararbeiði eisini gjørd uttan fyri landoddarnar, eitt nú í Íslandi, har felagið hevur verið lutur í fleiri verkætlanum.

Guggan sigur, at tey í løtuni ikki hava nakað arbeiði í Íslandi, og at sum landið liggur nú, verður so einki á hesum marknaðinum í ár. Í Grønlandi hava tey tó úr at gera. Í fjør keypti J&K seg inn í eitt grønlendskt virki, og um summarið, tá arbeitt verður har uppi, er sonurin, Stein Olvur, leiðari av virkseminum har uppi.

### Varðveita rótina

Hóast tey soleiðis royna at vera úti um seg á útlendsku marknaðunum, so merkir hetta ikki, at tey halda seg hava ov lítið at gera á heimliga marknaðinum.

Guggan greiðir frá, at tey í løtuni hava úr at gera her heima eisini. Serliga er tað betonsøluna tey satsa uppá, men eisini í samband við ætlaðu gerðina av Vágatunlinum, roynir felagið at liggja framvið, har tey í samstarv við norskt felag eru við í útbjóðingini.

Hóast felagið sostatt er bæði broytt og vaksið heilt nógv síðani stovnanina fyri 25 árum síðani, so er virkið ikki endavent av hesi orsøk.

Til stuttleikar nevnir Guggan at enda, at fyrsti maður, sum varð settur í starv hjá virkinum, framhaldandi starvast hjá teimum. Starvsfelagarnir eru tó nakað fleiri í tali nú. Vanliga einir 40, meðan tað um summarið táttar móti teimum hálvt hundrað.

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

ALUFELGUR
STÓRT ÚRVAL AV DEKKUM OG ALUFELGUM

Dømi: 4 felgur 15" og 4 dekk 195/50x15
EINANS 5.900,-
P/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo
Sosialurin - 311820